

# Statoil undir fleiri sparingar

**Jan Müller**

06.02.2014 - 22:50

Oljan.fo

**Norska Statoil, sum í eina tíð hevur framt og boðað frá fleiri stórum sparingum, fer nú undir nýggj sparitiltøk og fer at skerja útreiðslur til viðlíkahald og umvæling á norska landgrunninum.**

Statoil hevur longu kunnað sínar veitarar um, at tað fer at finna skerjingar uppá 20-30% í ár, skrivar offshore.no.

“Tað er semja í Statoil um at betra úrslitið við at minka um uttanhýsis kostnaðir við 30% uttan at økja um talið av Statoilarbeiðarum,” váttar kunningarstjórin í felagnum,Ørjan Heradstveit.

Skerjingarnar skulu gerast við, at Statoil ístaðin brúkar síni egnu fólk til at gera uppgávurnar, sum annars hava ligið uttanfyri Statoil.

Sum skilst er talan um skerjingar uppá einar 7 mia. kr. árliga og eru uppsagnir og lækking av útreiðslum til veitarar partur í eini roynd at minka um kostnaðarstøðið, sum Statoil metir vera alt ov høgd.

Herfyri kom fram, at Statoil fer at siga upp 100 leiðandi fólkum innan forrætningsmenning. Undan tí eru 239 fólk søgd upp innan IT ogognarrakstur, og búskapur/fígging hvørvur heilt í Statoil, tí tað verður "outsoursað" til uttanhýsis veitarar.